**Føroyameistarakappingin í Go Kart fyri virkir byrjar leygardagin 20. juni**



# Go Kart kapping

KAPPING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Talan er um kappingina Føroya Tele Cup, sum verður í vikuskiftunum 20.-21. juni og 27.- 28. juni.

Tað er motorsúkkluhandilin AD-Import í Havn, ið skipar fyri kappingini, sum verður á økinum hjá Føroya Tele í Hoyvík.

Agnar Dahl frá AD-Import sigur, at fleiri virkir hava teknað til, og hvønn dag leggjast nøkur afturat.

Kappingin verður skipað við einum innleiðandi umfari, og síðan eini kapping um meistaraheitið.

Agnar Dahl sigur, at ætlanin er at gera hetta til eitt afturvendandi tiltak, og verður eitt ferðasteyp latið til vinnandi fyritøkuna. Ferðasteypið kann einans ognast eftir at sama fyritøka hevur vunnið føroymeistaraheitið 3 ár á rað ella 5 ár samanlagt. Umframt ferðasteypið sleppa tey á vinnandi fyritøkuni at eta seg mett á Pizza 67 (max. 25 fólk).

Enn ber til at tekna virkir til kappingina. Tilmeldingarskjal er at finna á heimasíðuni: www.ad-import.fo.

*Samrøða er við Agnar Dahl frá AD-Import á Bilradio hósdagin kl. 17.10*





*Sunnudagin 14. juni verða 30 Morgan sportsvognar sýndir fram í Tivoli í sambandi við at Morgan fylla 100 ár. Á myndini er ein av luttakarunum Chr. Ingholt við einum Morgan 8 frá 1989*

# Morgan í Tivoli

FRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sambandi við at 100 ár eru liðin síðan enska bilverksmiðjan Morgan Motor Company varð stovnað í 1909, verður ein stór Morgan framsýning í Tivoli í Keypmannahavn sunnudagin 14. juni.

Framsýningin í Tivoli byrjar sunnudagin kl. 10.30 og verður til umleið kl 17. Á framsýningini eru øll modellini hjá Morgan. Heilt frá teimum fyrstu við trimum hjólum til teir nýggjastu superbilarnar við V6 og V8 motorum.

Samstundis verður tað fyrstu ferð at jubileumsbilurin Morgan Aeromax alment verður sýndur fram í Danmark, har ein Aeromax kostar 2,4 milliónir krónur. Aeromax hevur ein 4,8 litra V8 motor frá BMW við 367 hk og toppferðin er 275 km/t. Tað verða einans gjørdir 100 Aeromax, sum allir eru seldir.

Tað eru Morgan-Club Danmark og Dansk Veteranbil Klub, sum standa fyri framsýningini í Tivoli.

Í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið koma millum 16 og 18 Morgan til Føroyar í september.



*Rowan Atkinson (Mr. Bean) er ein av eigarunum av nýggja Morgan Aeromax*

## Mazda stjóri við í Air France 447

Á evropeiska høvuðssætinum hjá Mazda Motor Europe í Týsklandi var sorg og saknur eftir at tað varð váttað, at teirra PR-stjóri Neil Stuart Warrior var við í Air France 447, sum datt niður í Atlantarhavið á veg frá Rio til Paris á hvítusunnu.

Neil Warrior var 45 ára gamal, føddur í Hillingdon í Onglandi og hevði universitetsútbúgving. Eftir eina fortíð sum leiðandi PR-maður hjá m.a. italsku Fiat og Alfa Romeo, fekk hann í 2007 starv sum PR-stjóri hjá Mazda Motor Europe.

En minnisløta fyri teimum deyðu var í Köln í Týsklandi seinasta mánadag.

**mg**



*Neil Stuart Warrior*

# Flottasti konseptbilur 2009

Volvo S60 Concept Car, sum fyrstu ferð varð sýndur fram á Detroit Motor Show í januar 2009, er av lesarum hjá bilblaðnum Auto Bild kosin sum flottasti konseptbilur 2009.

Tilsamans 200.000 lesarar úr 27 londum vóru við í eini internet-atkvøðugreiðslu um flottasta konseptbilin 2009. Volvo S60 vann kappingina, sum var millum 28 aðrar konseptbilar. Auto Bild er største bilablað í Evropa.

**mg**





